UTTAN ÚR HEIMI

# Børn verða rænd og nýtt sum gøgnlatarar

**Ein brasilsk nunna vil vera við, at nógv børn í Mosambik verða rænd, og at gøgn teirra síðani verða seld**

HANDIL VIÐ GØGNUM
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Brasilska nunnan Maria Elida leggur myndugleikarnar í afrikanska landinum Mosambik undir at fjala útyvir, at nógv børn har verða rænd, og at rænararnir síðani selja yvisk gøgn hjá børnunum.

Í samrøðu við portugisiska blaðið Lusa sigur tann 45 ára gamla nunnan, at stjórnin í Maputo ger alt fyri at dylja veruleikan. Ríkisákærin í landinum hevur lovað at kanna málið, men sambært Mariu Elida hava kanningarnar verið ógvuliga tilvildarligar, og harafturat hevur ríkisákærin verið undir stórum trýsti frá ónevndum sterkum kreftum, sum vilja hava hann at sleppa kanningunum, sigur hon.

Vararíkisadvokaturin í Mosambik, Rafael Sebastio, sigur við Lusa, at einki hald er í tí, sum nunnan sigur. Á einum tíðindafundi fyrr í vikuni segði hann, at myndugleikarnir hava ikki funnið nøkur prógv fyri, at nakar hevur selt gøgn hjá rændum børnum. Hann viðgekk, at børn eru rænd undir ógreiðum viðurskiftum, men endamálið var ikki at taka gøgn úr teimum, segði hann.

Men Maria Elida heldur uppá, at handilin við gøgnum úr rændum mosambiskum børnum er umfatandi. Sjálv hevur hon arbeitt í Mosambik í níggju ár.

# Fyrsti fangin deyður

**Stanislav Ryniak var fyrsti fangin í nazistisku týningarleguni Auschwitz. Fyrr í vikuni doyði hann**

FANGI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Stanislav Ryniak fór til gravar í Wroclaw í Pólandi mikudagin. Hann var 89 ára gamal, nú hann doyði.

Stanislav Ryniak varð tikin í heimbýnum Sanok í mai í 1940. Hann var tá 24 ára gamal, og týskararnir vildu vera við, at hann var uppi í polska mótstøðuherinum. Ein mánað seinni sendu týskararnir tað fyrsta tokið við fangum til týningarleguna Auschwitz.Í tokinum vóru fleiri hundrað polskir fangar, og ein teirra var Stanislav Ryniak.

Fangarnir fingu hvør sítt nummar, sum varð tatoverað á armin. Týskararnir gjørdu av, at 30 týskir brotsmenn skuldu skrásetast fyrst. Stanislav Ryniak fekk nummar 31, og hann sostatt tann fyrsti fangin í leguni.

Í 1944 varð hann fluttur til arbeiðsleguna Leitmeritz, sum í dag er í Kekkia. Har arbeiddi hann, til kríggið endaði. Tá hann slapp leysur, vigaði Stanislav Ryniak 80 pund.

- Eg dugi ikki at siga, hvussu eg helt mær á lívi. Men eg spyrji enn tann dag í dag, hvaðani eg fekk megi til tað, segði hann í samrøðu við polsku tíðindastovuna PAP í 1995.

Nazistarnir bygdu leguna í Auschwitz í 1940. 1,5 milliónir fangar, teir flestu jødar, doyðu har.



*Louise Arbour*

*Mynd: Reuters*

# Heimsins nýggi varðhundur

**Kanadiski dómarin og fyrrverandi ákærin í krígsbrotsmannadómstólinum hjá ST, Louise Arbour, er tilnevnd hákommiserur í mannarættindamálum. Eitt gott val til eitt krevjandi starv**

MANNARÆTTINDI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Løgfrøðina dugir hon uttanat, og so er hon ikki bangin fyri at siga nøkrum ímóti, heldur ikki heimsins týdningarmestu leiðarum. Taðer tann stutta lýsingin av kanadiska dómaranum Louise Arbour, sum Kofi Annan, ST-aðalskrivari, hevur sett sum hákommiser í mannarættindamálum.

Hetta er eitt starv, sum krevur støðufesti, dirvi og áhaldni. Ikki minst í hesum tíðum, nú bardagin ímóti yvirgangi hóttir við at skúgva mannarættindini til viks. Um allan heimin verða mannarættindini traðkað undir fót, eisini í Vesturheiminum. Neyðugt sum lið í bardaganum ímóti yvirgangi verður sagt.

Í Guantanamo á Kuba hava amerikanararnir 600 fangar sitandi, og aðrastaðni kring heimin sita yvirgangsfangar handan rimarnar. Hetta eru dømi um, hvørjar avleiðingar bardagin ímóti yvirgangi hevur havt fyri tað, sum vit vanliga kalla mannarættindi.

## Ein djørv kvinna

Flestu mannarættindafelagsskapir eru á einum máli um, ater tað nakar, sum kann átaka sær uppgávuna sum hákommiserur í mannarættindum, er tað tann 57 ára gamla Louise Arbour. Júst mannarættindafelagsskapirnir halda eitt vakið eyga við arbeiðinum hjá hákommiserinum og aftra seg ikki við at gera vart við mistøk.

- Louise Arbour hevur júst teir eginleikarnar, sum eru neyðugir hjá tí, sum skal verja mannarættindini. Hon hevur víst, at hon letur seg ikki ræða, heldur ikki av teimum ringastu bølmennunum, sigur Reod Brody í mannarættindafelagsskapinum Human Rights Watch.

Tað var millum annað sum høvuðsákæri í ST-krígsbrotsmannadómstólinum fyri gamla Jugoslavia, at Louise Arbour vísti síni evni, og tað gjørdi hon eisini, tá hon var ákæri í dómstólinum, sum viðgjørdi krígsbrotsverkini í Rwanda. Hetta var í árunum frá 1996 til 1999, og har prógvaði hon, at hon hevur dirvi til at taka illa lýddar avgerðir. Í 1999 var hon við til at reisa mjálið ímóti serbiska leiðaranum Slobodan Milosevic, sjálvt um nøkur av londunum í Vesturheiminum vóru ímóti tí. Tey vildu heldur hava eina friðaravtalu við serbiska leiðaran.

Tað var eisini Louise Arbour, sum tók avgerð um at kanna, um NATO hevði framt krígsbrotsverk, tá flogfør hjá samgonguni bumbaðu mál í Serbia undir Kosovo-krígnum. Hon var ikki liðug við kanningarnar, tá hon fór frá sum høvuðsákæri í Haag. Eftirmaður hennara, sveitsiska Carla del Ponte, hevur fyribild fríkent NATO.

## Vald uttan atkvøðugreiðslu

Louise Arbour, sum er fødd í Montreal í Kanada í 1947, tekur við sum hákommiserur í mannarættindamálum eftir brasilan Sergio Vieira de Mello, sum doðyi, tá ST-støðin í Bagdad bleiv sprongd í luftina í august í fjør. Hon hevur verið virkin løgfrøðingur í mong ár og hevur skrivað fleiri vísindaligar greinar um borgararættindi og mannarættindi. Síðani 1999 hevur hon verið hægstarættardómari í Kanada, og hon ber orð fyri at vera ein av teimum mest frælslyntu dómarunum har.

Kofi Annan hevur leingi roynt at fáa Louise Arbour at átaka sær starvið sum hákommiserur í mannarættindum. Í fyrstani segði hon nei. Henni dámdi væl starvið í hægstarætti, men kanadiska stjórnin vildi fegin hava hana at taka av tilboðnum frá ST, og kanska var tað í seinna enda tað, sum fekk hana at taka av.

Tað er vert at leggja til merkis, at ST nýttist ikki at atkvøða um starvssetanina, tí øll tey 191 limalondini tóku undir við at seta Louise Arbour í starvið sum heimsins nýggi varðhundur.



# Statoil og Dong við í boring í summar

LEITING
*Jan Müller*

Tvey av oljufeløgunum, sum eru við í leitingini á landgrunninum, tað norska Statoil og tað danska Dong eru farin uppí eitt samtak, sum skal bora ein brunn beint hinumegin markið í summar. Tað snýr seg um eitt samtak, har ChevronTexaco og OMV hava eitt loyvi norðaliga á bretskum øki, skamt frá okkara marki, í teigunum 213/26 og 213/27, har talan er um tvey prospekt, tvs. mál í undirgrundini við serligum áhuga, nevnd Rosebank og Locknagar. ChevronTexaco átti 80% í hesum loyvinum men hevur nú selt 30% til Statoil og 10% til Dong, meðan OMV hevur 20%.

ChevronTexaco sigur í tíðindaskrivi, at ætlanin er at bora ein brunn í summar við boriskipinum West Navigator. Boristaðið er umleið 9 fjórðingar frá føroyska markinum.

Rúni Hansen, stjóri í Statoil segði við útvarpið mikudagin, at teir hava gjørt av at fara við í hesa boringina, tí hon sær áhugaverd út. – Okkara primera mál er at finna olju, har vit nú fara at bora. Haraftrat liggur boristaðið so nær føroyska markinum, at vit kunnu fáa nakað av vitan frá hesi boringini, sum vit kunnu brúka í Føroyum. Statoil vónar, at teir koma at kenna jarðfrøðina í Føroyum nakað betri við at bora ein brunn so tætt uppat markinum, soleiðis at tað kann vera ein gevinstur fyri Føroyaøkið eisini í framtíðini.

Rúni Hansen vísti eisini á, at ein og hvør brunnur í økinum kann geva eina týðandi vitan, og Statoil metir, at vitanin frá boringini hinumegin markið kann vera við til at loysa upp fyri nøkrum í Føroyum eisini, soleiðis at man eisini kann gerast betur til at tulka seismikkin í Føroyum her.



*Ovari pílurin vísir teigin, har Statoil og DONG nú verða við í einari boring. Niðari pílurin vísir ein annan teig, har eisini verður borað í summar. Har er Amerada Hess fyristøðufelag, men bæði DONG og ChevronTexaco eru við har eisini*




## ÁRSAÐALFUNDUR

**Boðað verður við hesum til ársaðalfundar**
**í Føroya Sparikassa P/F**

fríggjadagin 12. mars 2004, kl. 17:00
í B36-húsinum, Gundadalur, Tórshavn.

**Dagsskrá**

1. Frágreiðing frá nevndini um virki Sparikassans í farna ári
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapi til góðkenningar
3. Avgerð um nýtslu av yvirskoti ella rindan av halli sambært góðkenda roknskapinum
4. Heimila nevnd at lata Sparikassanum ognast egin partabrøv í tíðini fram til næsta ársaðalfund
5. Val av nevndarlimum
6. Val av grannskoðara
7. Ymiskt

Grannskoðaði ársroknskapurin og ársfrágreiðingin liggja frammi á stjórnarskrivstovuni, Yviri við Strond 2 frá 4. mars 2004.

Partaeigarar hava við at vísa atgongdarkort atgongd til aðalfundin, har teir hava talurætt, men ikki atkvøðurætt.

Atgongdarkort verða á deildum Sparikassans útflýggjað teimum partaeigarum, sum í seinasta lagi mánadagin 8. mars 2004 hava biðið um hetta.

Tórshavn, hin 23. februar 2004.

Nevndin

REPROZ

FØROYA SPARIKASSI



## Broyting í almennu viðskiftatreytunum

- galdandi frá 1. apríl 2004

Føroya Tele ger vart við, at § 9 í almennu viðskiftatreytunum hjá Føroya Tele verður broytt frá 1. apríl 2004, soleiðis at hendan orðing verður sett inn í § 9:

"*Tá hald hjá kunda fleiri ferðir áður hava verið stongd ella slitin vegna munandi mishald, kann Føroya Tele tó, tá kundin aftur munandi misheldur sínar skyldur, steingja eitt ella fleiri hald hjá kundanum uttan ávaring.*"

Almennu viðskiftatreytirnar kunnu síggjast í telefonbókini hjá Føroya Tele, umframt at almennu viðskiftatreytirnar kunnu lesast á www.tele.fo

Faldari við almennu viðskiftatreytunum fæst í telebúðunum kring landið.

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum*